# Vakstarmøguleikar í maritimu veitaravinnunum



Vakstrarforum

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

## VISIÓN

*Føroyar, føroyskar havnir og føroyskir veitarar skulu altíð vera fyrsta val hjá skipum í Norðuratlantshavinum*

# ARBEIÐSSETNINGUR **OG GRUNDARLAG**

Arbeiðsbólkurin, sum er settur at arbeiða við vakstrarmøguleikum í maritimu veitaravinnunum, er hesin:

Esther Dahl, forkvinna, Suni Justinussen, Jens Meinhard Rasmussen, Gudny Langgaard, Mouritz Mohr og Bjarni Mortensen, skrivari.

Arbeiðssetningurin, sum Vakstrarforum hevur givið bólkinum, er:

*"Bólkurin skal vísa á vakstrarmøguleikar í maritimu tænastuvinnunum. Viðkomandi er bæði at lýsa verandi útflutning av vørum og tænastum, og ótroyttar møguleikar fyri øktari samvirkan í vinnuni. Hugsað verður m.a. um nýggj vinnuøki innan skipasmíð og grønar orkuútbyggingar, niðurtøku av gamlari tøkni, tænastur til ferðsluna í Norðuratlantshavi v.m. Yvirhøvur møguleikar, har førleikar í vinnuni og landafrøðiliga støða Føroya verða gagnnýtt til fulnar."*

Arbeiðshátturin hjá bólkinum hevur verið soleiðis, at formaður og skrivari hava havt fundir og samrøður við aktørar í vinnuni, samstundis sum limirnir í bólkinum hava tikið sær av sínum serøkjum.

Harafturat hevur bólkurin brúkt lutfalsliga nýggju frágreiðingarnar, ið eisini lýsa evnini, bólkurin hevur arbeitt við. Hesar eru serliga:

> Sjóvinnuveitingar 2017 - (Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Oljuvinnufelagið)

> Sjóvinnupolitikkurin frá 2017 - (Uttanríkis- og Vinnumálaraðið)

> Føroyar í Arktis 2013 - (Løgmansskrivstovan - Uttanríkistænastan)

Áðrenn henda frágreiðing varð løgd fram fyri Vakstrarforum, varð hon løgd fram fyri nevndina í Sjóvinnufelagnum, og onkrar tillagingar eru gjørdar eftir hetta.

## EIN VEITARAVINNA Í VØKSTRI STUÐLAR UNDIR ST-HEIMSMÁL NR. 9 OG NR. 12






# MARITIMAR **VEITARAVINNUR**

**Maritimar veitaravinnur eru í hesum sambandi vinnur, ið veita maritima útgerð og maritimar tænastur til vinnuna á sjónum. Veitaravinnan fevnir um alt frá skipasmiðjum og smiðjum til fólkaflutning og proviantering.**

Á myndini á næstu síðu sæst, hvussu víðfevnd hendan vinnan er. Nevnast kunnu skipasmiðjur, aðrar smiðjur, havnir, agency feløg, veitarar av útgerð til fiskiskip, heilsølur, oljufeløg, kavarar, elektrikarafyritøkur v.m.

Nógvar av fyritøkunum, ið eru maritimir tænastuveitarar, eru eisini í øðrum vinnum. Av hesi orsøk eru hagtølini fyri, hvussu stórur partur av virkseminum er til maritimu vinnurnar ikki beinleiðis atkomilig.

Maritimar veitaravinnur eru sostatt ikki ein homogen vinna, og hon er trupult at lýsa samlað, og tað er ikki lætt at finna góð hagtøl fyri vinnugreinina.

Sjóvinnufelagið (fyrr Oljuvinnufelagið), sum er vinnugreinafelagið hjá hesum fyritøkum, arbeiðir við at lýsa og marknaðarføra Føroyar sum maritiman tænastudepil og hevur gjørt heimasíðuna www.maritime-services.com.

Á heimasíðuni verða lýstar allar tær tænastur, ið føroyskar fyritøkur kunnu veita.

Ein samanumtøka av tænastunum er á myndini á næstu síðu.



**MARITIMAR TÆNASTUR TIL VINNUNA Á SJÓNUM**




Kelda: Sjóvinnufelagið

# REIÐARAVIRKSEMI, FISKIVINNAN **OG ALIVINNAN EIN FORTREYT**

**Grundarlagið undir maritimu veitaravinnuni eru fiskivinnan, flutningsvinnan á sjónum, oljuvinnan og alivinnan, hereftir kallað avtakaravinnan.**

Tað er týdningarmikið at hava í huga, at maritima tænastuvinnan virkar og mennist saman við hesum vinnunum. Virksemið í maritmu veitaravinnuni er tí tengt at, hvussu tað gongur í avtakaravinnuni.

Virksemið hjá føroysku alivinnuni er økt nógv í vavi seinnu árini, og tøkniliga menningin hevur verið stór. Sama ger seg galdandi í pørtum av fiskivinnuni, og seinastu knapt 15 árini eru Føroyar eisini vorðnar størri á shipping-økinum.

Hesar vinnur eru sostatt kjarnan í avtakaravinnuni. Um t.d. shipping og reiðarí vaksa og/ella gerast fleiri, so betrast fortreytirnar fyri vøkstri hjá maritimu veitaravinnuni.

Í 2017 varð álitið Sjóvinnupolitikkur 2017 latið úr hondum. Hesin politikkur var ætlaður at vera eitt amboð til, at sjóvinnan gerst ein enn størri drívmegi fyri vøkstri í føroyska samfelagnum. Tað er týdningarmikið, at arbeiðið við teimum tilmælum, sum eru í hesum politikki, heldur á.

Ein fortreyt fyri, at Føroyar framhaldandi kunnu vera ein sterk sjóvinnutjóð er, at viðkomandi útbúgvingar áhaldandi eru kappingarførar og dagførdar í mun til altjóða krøv v.m. Føroysk prógv skulu samsvara við og vera góðkend av londunum kring okkum.

Tað er ein sannroynd, at veitaravinnan er ein hornasteinur í føroysku yrkisútbúgvinga-skipanini.

Tað er eisini sera týdningarmikið, at tað ber til hjá sjófólki at hava nøktandi skeiðstilboð í Føroyum.

Føroyar eru sera tengdar at sjóvinnunum. Sterk spesialisering er í Føroyum innan fiskiskap, fiskivinnu á landi, alivinnu, og sjóvegis flutningsvinnu. Fleiri føroyskar fyritøkur virka innan oljuvinnuna. Bæði fyritøkur og starvsfólk hava høgar førleikar og drúgvar royndir.

Tøkniliga støðið hjá alifeløgum, skipum, skipasmiðjum og verksmiðjum gert alsamt hægri, og spesialiseraðar veitarafyritøkur hava ein avgerandi leiklut í hesari gongdini.

Ein framkomin avtakaravinna eftirspyr ofta nýggja tøkni, og nýggj tøkni setur krøv til veitaravinnuna, sum tí alsamt má vera í menning. Tað er ein styrki fyri menningamøguleikarnar hjá føroyskum veitarafyritøkum at menna loysnir saman við framkomnu føroysku fyritøkunum í maritimu vinnunum. Føroyar kunnu vera ein góð royndarstova í sambandi við vørumenning.

Bólkurin metir tí, at útflutningurin av vørum og tænastum átti at verið væl størri, enn hann longu er.

Umframt at hetta hevur stóran týdning fyri menningina av føroysku fyritøkunum, hevur hetta við sær, at førleikarnir hjá veitarafyritøkunum verða sterkari og serfrøðin hækkar. Um fyritøkurnar einans virka á føroyska heimamarknaðinum, er breidd og fleksibilitetur neyðug, men við at vaksa um marknaðin til eisini at fevna um útflutning, fáa veitarafyritøkurnar vitan, vørur og tænastur, sum kunnu skapa eitt størri flow í virksemi.

Menningarmøguleikar liggja í einum meira framsóknum hugburði til at útflyta vørur og tænastur.

## VEITARAVINNAN OG AVTAKARAVINNAN




**TILMÆLI:**

- Tryggja at føroyska fiskivinnan er burðardygg, soleiðis at hon framhaldandi verður ein drívmegi fyri føroyska vinnu sum heild
- Tryggja at føroyska alivinnan er burðardygg og fær bestu treytir at arbeiða undir
- Styrkja og menna grundarlagið undir eini føroyskari shippingvinnu
- Arbeiðast skal fyri, at Føroyar fáa dupultskattaavtalur við allar viðkomandi marknaðir
- At Føroyar gera seg galdandi sum altjóða maritimur útbúgvingar og skeiðsdepil
- Á miðnámi eiga lærugreinar, sum stuðla undir eina sterka avtakaravinnu at verða mentar, t.d. shipping lærugreinar
- Ein miðallong útbúgving innan logistik og shipping eigur at verða sett á stovn í Føroyum
- Miðallangar tøkniligar útbúgvingar eiga at verða mentar - serliga innan automatisering
- Stuðul til menningarátøk innan maritimar veitaravinnur eigur at verða raðfest



# ÚTFLUTNINGS- OG VINNUFRAMI **OG ÓTROYTTIR MØGULEIKAR VIÐ ØKTARI SAMVIRKAN**

**Á heimamarknaðinum eru maritimu veitaravinnurnar tengdar at gongdini í martimu avtakaravinnunum í Føroyum. Hetta avmarkar vakstrarmøguleikarnar hjá vinnuni. Skulu maritimu veitaravinnurnar av álvara vaksa, er neyðugt við størri útflutningi av vørum og tænastum.**

Tørvur er á, at Føroyar aftur seta skipað fokus á útflutningsframa, og at ætlanirnar, sum leingi hava verið um at marknaðarføra Føroyar sum maritiman tænastudepil, verða framdar í verki.

Hetta krevur at orka verða settar av til økið, og til eitt alment og privat samstarv í brandingini av føroysku veitaravinnuni. Føroyskar fyritøkur eru lítlar í altjóða høpi. Tað er tí neyðugt, at føroyska vinnan bjóðar seg fram í felag. Men tað er samstundis alneyðugt, at almennu Føroyar hava útflutningsframa á yvirskipaðum støði.

Visit Faroe Islands er ein góður leistur, sum hevur lyft ferðavinnuna í Føroyum saman við vinnulívinum. Hetta er ein skipan, sum kann brúkast sum fyrimynd í sambandi við útflutning av vørum og tænastum til maritima økið, og eisini til at menna hugburðin til útflutning í føroysku vinnuni.

Ein lítil játtan er á fíggjarlógini til at gera Føroyar til maritiman tænastudepil, men játtanin er ógvuliga lítil og endamálið kanska heldur ikki so rótfest. Viðmerkjast kann til dømis, at játtanirnar á fíggjarlógini til útflutning av føroyskum tónleiki (FMX) og bókmentum (FARLIT) eru munandi størri.

Innan fiski- og alivinnuna er vanligt, at føroyskar fyritøkur standa saman á messum uttanlands. Hetta hevur eisini verið gjørt fyri veitingarvinnurnar á oljumessum. Til dømis var samskipað luttøka á oljumessunum í Stavanger og Aberdeen í nógv ár. Hendan luttøkan er tíverri dottin niðurfyri, m.a. tí, at stuðulin hjá tí almenna, fíggjarligur og umsitingarligur, er fallin burtur.

Eftir at almenni leikluturin í sambandi við útflutningsframa minkaði munandi fyri góðum 10 árum síðani hevur Vinnuhúsið samskipað luttøku á størru fiskarímessunum. Hetta varð gjørt, tí tørvur var á, at onkur gjørdi tað, men samskipanin fevnir einans um sjálvar messurnar. Hon fevnir ikki um útflutningsframa sum eitt áhaldandi arbeiði mótvegis myndugleikum og marknaðum uttanlands.

Luttøka á messum er gevandi og týdningarmikil, men kann als ikki standa einsamøll. Arbeiðið má gerast áðrenn og eftir, at messur hava verið. Tørvur er á, at tað almenna átekur sær ein størri leiklut í sambandi vil útflutning hjá føroysku veitingarvinnuni.

Føroysku sendistovurnar hava ein týdningarmiklan leiklut í at lata hurðar upp og skapa sambond. Tí eiga føroysku sendistovurnar at hava ein greiðari handilspolitiskan og útflutningsfremjandi profil og gott innlit í føroysku vinnuna. Í fleiri førum eru sendistovurnar aktivur viðleikari, tá nýggir marknaðir skulu troytast og mennast, men tørvur er á, at hetta arbeiðið verður institutionaliserað.

Vinnan eigur eisini at verða betri kunnað um teir møguleikar, hon hevur at brúka donsku sendistovurnar, sum í flestu førum hava skipaðar útflutningsfremjandi eindir.

Stórir og áhugaverdir marknaðir eru tætt við Føroyar. Mett verður, at skilagott er í fyrstu syftu at leggja dent á grannalondini Bretland, Ísland, Norra, Danmark og Grønland. Tí skal arbeiðast fyri, at møguligar handilsforðingar millum Føroyar og hesi lond verða tiknar burtur.

Vinnan hevur ofta víst á, at tørvur er á fleiri dupultskattaavtalum. Tørvur er framvegis á hesum.

Nógv menning og nýskapan fer fram í samstarvi millum fyritøkur. Nógv óformelt samstarv er millum føroyskar veitaravinnur í dag. Í mun til størri menningaruppgávur kann tað vera gevandi, at skikkað fólk fasiliterar tilgongdina.

## TÆNASTUR TIL SKIP OG BORIPALLAR OG AGENCY VIRKSEMI

Nógv skipaferðsla er framvið Føroyum og í føroyskum øki. Við nýggju siglingarleiðunum fer hendan ferðslan væntandi at økjast komandi árini.

Skipini og annað sjóvinnu virksemið við Føroyar skal proviantera, skifta manning, bunkra, viðlíkahaldast og umvælast. Her hevur føroysk vinna góðar møguleikar at bjóða seg fram.

Føroyskar fyritøkur hava seinnu árini fingið nógvar uppgávur í olju- og frálandavinnunum í altjóða høpi. Hetta hóast onki oljuvirksemi er í føroyskum øki í løtuni.

Hinvegin er nógv oljuvirksemi beint upp, at føroyska markinum. Føroyskar fyritøkur kunnu veita eina breiða viftu av frálanda- og øðrum maritimum tænastuveitingum, harímillum telefon- og samskiftistænastur.

Væntandi fer oljuvirksemið at vera nærhendis føroyska markinum fleiri ár frameftir. Harumframt eru í bretskum øki ætlanir um stórar vindmyllulundir, ið eisini fara at hava tørv á tænastum, ið føroyskar fyritøkur eru førar fyri at veita.

Sambandið úr Vágum til meginlandið í Evropa er betri enn hjá okkara nærmastu grannum í Hetlandi og norður Skotlandi.

Tað kann tí loysa seg at fremja manningarskifti umvegis Føroyar. Eisini í hesum sambandi er branding og sølufremjandi átøk av stórum týdningi.





**TILMÆLI:**

**Skipað arbeiði við útflutningsframa verður sett í gongd. Játtaðar verða 5 mio. kr. til at seta á stovn Export Faroe Islands, ið skal:**

> Fremja hugburð í mun til útflutning
  - At fyritøkur síggja virði í at hugsa størri enn bara Føroyar í mun til sølu av vørum og tænastum
  - Fáa føroyingar at síggja stóru inntøku-møguleikarnar, sum eru í útflutningi
  - Styrkja dirvi hjá føroyskum fyritøkum í mun til at virka á altjóða marknaðinum

> Fremja málrættað arbeiði við útflutningi
  - Fáa fyritøkur at seta orku av til at arbeiða meira málrættað við útflutningi
  - Hjálpa fyritøkum at arbeiða miðvíst við útflutningi
  - Eyðmerkja geografisk mál fyri útflutningin

> Økja um møguleikan hjá fyritøkum at útflyta
  - Ráðgeving í mun til útflutning til ymisk lond
  - Skipa samstarv millum føroyskar fyritøkur í mun til at fáa kundar til Føroya
  - Skipa fyri tiltøkum í teimum ymisku londunum og á teimum ymisku marknaðunum

> Skapa málrættað fokus á útflutning á føroysku sendistovunum
  - At tryggja at føroyska sendistovurnar hava nøktandi útflutningsfremjandi førleikar og uppgávur

> Skapa betri kunnleika til, hvussu donsku sendistovurnar kunnu brúkast á marknaðum, har ongar føroyskar sendistovur eru



# GRØNA ORKUSKIFTIÐ OG **MARITIMAR VEITARAVINNUR**

**Arbeiðið at mótvirka veðurlagsbroytingum setir eisini dagskránna innan tær maritimu vinnurnar og maritimu veitaravinnurnar.**

Í sjóvinnufelagsskapinum hjá ST, IMO, bleiv í 2018 samtykt ein strategi fyri, hvussu útlátið av vakstrarhúsgassum frá skipum kann minkast. Málið er, at útlátini skulu minkast við í minsta lagi 50% í 2050.

Umframt reiðaríini, so hava veitarar av tøkni og øðrum tænastum ein avgerandi leiklut í arbeiðinum at røkka málinum.

Arbeitt verður við fleiri ymiskum loysnum, har brennievni, ið eru umhvørvisliga burðardygg, kunnu koma í staðin fyri oljuna.

Nógvar av teimum teknisku loysnunum eru ikki kendar í dag. Tænastuveitarar við serkunnleika fara tó heilt vist at hava sínar týdningarmiklu leiklutir í hesari menningini. Tí er neyðugt at stuðla undir, at føroyskar fyritøkur eru nóg dugnaligar til at nýta stóru menningarmøguleikarnar í tilgongdini mótvegis burðardyggari sjóvegis flutningi, fiskiskapi og alivinnu.

Nógvar verkætlanir eru í dag settar í verk fyri at siglast kann við minni ávirkan á umhvørvið. Til dømis eru nýggj krøv um, at minni svávul skal vera í roykinum. Tær teknisku loysnirnar geva arbeiði til m.a. skipasmiðjur, undirveitarar og klassafeløg. Eitt annað dømi eru nýggj altjóða krøv er um Ballast Water Treatment Systems. Hetta er eisini ein  stór vinna við menning, framleiðslu, sertifisering, ið gevur møguleikar hjá føroyskum veitarum. Eitt føroyskt dømi har fyritøkur samstarva um at seta í verk burðardyggar loysnir er verkætlanin "Burðardygt vinnulív" har 12 fyritøkur hava bundið seg til at minka CO2 útlátið við 50% áðrenn 2030.

Ein onnur verkætlan fyri størri burðardygd er grøna tvíkiljan, sum burturav nýtir elorku, og sum verður bygd í Føroyum til alivinnuna. Talan er um verkætlan, sum Norðurlendska Ráðharraráðið og Føroya Landsstýri hava tikið stig til. Báturin verður smíðaður til Bakkafrost.

Verkætlanin fær 4 milliónir krónur í stuðli frá Norðurlendska Ráðharraráðnum. Tøkniliga er talan um eina loysn, ið í stóran mun byggir á, at kend tøkni verður sett saman á nýggjan hátt. Hendan verkætlanin kundi verið ein fyrimynd fyri, hvussu burðardyggar loysnir kunnu mennast í Føroyum.

Ein annað dømi er landstreymur. Um skip í føroyskum havnum fáa atgongd til landstreym, stuðlar hetta undir at reiðaríini tillaga skipini, so tey kunnu taka ímóti landstreymi. Hetta merkir, at reiðaríini fara at spyrja eftir grønum orkuloysnum frá veitaravinnuni, og tað hevur víðari við sær, at veitaravinnan má leggja seg eftir at hava førleikar at loysa avbjóðingar innan grønar orkuloysnir.

**TILMÆLI:**

> Stuðla undir at maritima avtakaravinnan eftirspyr grønar loysnir
  – herundir at føroyskar havnir bjóða atgongd til landstreym

> Altíð at fylgja altjóða sáttmálum innan grønar orkuloysnir, men at vera varin við at seta strangari krøv, tí føroyska kappingarføri er viðkvæmt

> At leggja seg eftir, at útbúgva føroyingar innan grøna tøkni og á henda hátt fremja grønar loysnir

# NIÐURTØKA AV GAMLARI TØKNI

**Avrigging av gamlari tøkni í sambandi við virksemi serliga innan oljuvinnuna er eitt sera stórt og nýtt virkisøki. Avrigging er at taka niður, burturbeina og endurnýta oljupallar og -útgerð, ið hevur tænt fyri seg.**

Staðfestast má, at hetta er ein nýggj og spennandi vinna, sum kann hava nógv at bjóða fyri føroyska vinnu. Mett verður til dømis, at í Norðsjónum fara at verða brúktar uml. 150 mia. kr. komandi 10 árini til avrigging.

Nógv útgerð, sum skal takast niður, er ikki so langt burtur frá Føroyum. Talan er um eitt áhugavert virkisøkið, og neyðugu førleikarnir verða mettir at vera í Føroyum.

Ein møguleiki er, at smærri oljupallar, ella partar av størri oljupallum, verða tiknir til Føroya. Stórur partur av arbeiðinum snýr seg um logistikk og fyriskipan

Uppgávan krevur nógv starvsfólk, stórt fysiskt øki umframt vitan og førleikar innan umhvørviskrøv.

Umframt at tað er ein avbjóðing, at arbeiðsloysið í Føroyum er ógvuliga lágt í løtuni, kann tað eisini verða ein avbjóðing, at lønarlagið er lægri, har hesar uppgávurnar verða loystar í dag. Hetta eigur at verða kannað nærri.

Føroyskar fyritøkur kunnu tó eisini vera við í hesari vinnuni uttan, at t.d. boripallar verða sleipaðir til Føroya. Verkfrøðingafyritøkur og aðrar vitanartungar fyritøkur hava møguleikar at loysa seruppgávur innan avrigging.

Feløgini, sum hava høvuðsuppgávurnar innan avrigging, bjóða nógvar uppgávur út til smærri veitarar. Hetta verður gjørt á serligum portalum.

Hóast talan er um virksemi, sum setir krøv til, at umhvørvisárin verða stýrd gjølla, kann sigast at talan er um "grøna upprudding". Heilt stórur partur av tilfarinum, ið verður tikið niður, verður endurnýtt.

Bæði skipasmiðjur, aðrar smiðjur, ráðgevandi verkfrøðingar o.o. kunnu fáa uppgávur á hesum øki.

Uppgávurnar fara eisini at hava við sær uppgávur til reiðarír innan olju vinnuna og aðrar flutningsfyritøkur.

Viðmerkjast skal, at FOÍB í løtuni ger eina frágreiðing fyri Sjóvinnufelagið um avrigging. Frágreiðingin verður liðug í summar. Í hesari frágreiðing verður tí ikki meira gjørt burturúr møguleikunum hjá føroyskum fyritøkunum.

**TILMÆLI:**

- Tryggja at føroysk lóggáva og regluverk eru nøktandi til at hendan vinnan verður sett á stovn í Føroyum
- Kanna á hvørjum økjum í hesi nýggju vinnugrein Føroyar eru serliga kappingarførar

**10 lyklatilmæli í frágreiðingini:**

- Tryggja at føroyska fiskivinnan er burðardygg, soleiðis at hon framhaldandi verður ein drívmegi fyri føroyska vinnu sum heild
- Tryggja at føroyska alivinnan er burðardygg og fær bestu treytir at arbeiða undir
- Styrkja og menna grundarlagið undir eini føroyskari shippingvinnu
- Játtaðar verða 5 mio. kr. til at seta á stovn Export Faroe Islands, ið skal:
  - Fremja hugburð í mun til útflutning
  - Fremja málrættað arbeiði við útflutningi
  - Økja um møguleikan hjá fyritøkum at útflyta
  - Skapa málrættað fokus á útflutning á føroysku sendistovunum
- Arbeiðast skal fyri, at Føroyar fáa dupultskattaavtalur við allar viðkomandi marknaðir
- Ein miðallong útbúgving innan logistik og shipping eigur at verða sett á stovn í Føroyum
- Miðallangar tøkniligar útbúgvingar eiga at verða mentar – serliga innan automatisering
- Stuðla undir, at maritima avtakaravinnan eftirspyr grønar loysnir
- At leggja seg eftir, at útbúgva føroyingar innan grøna tøkni og á henda hátt fremja grønar loysnir
- Kanna á hvørjum økjum innan nýggju vinnugreinina "avrigging" Føroyar eru serliga kappingarførar

Les meir á
**Vakstrarforum.fo**